# 35 svimjarar til Danmarkar

**Um vikuskiftið skulu føroysku svimjararnir royna seg saman við 700 øðrum norðurlendskum svimjarum í donsku stórkappingini Køge Open.**

SVIMJING
*Hilmar Jan Hansen*



*Teir 35 føroysku svimjararnir eru á venjingarlegu í Køge og Herfølge, til stórkappingini Køge Open byrjar fríggjadagin*

Fyrrapartin í gjár fóru 35 føroyskir svimjarar av landinum til Danmarkar at vera við í einari danskari stórkapping saman við øðrum norðurlendskum svimjarum.

Samanlagt eru umleið 700 svimjarar við í kappingini. Teir donsku koma úr 28 feløgum, og haraftrat eru svimjarar úr fýra svenskum feløgum og so føroysku landsliðssvimjararnir.

Kappingin, ið kallast Køge Open, er ikki svimjarunum ókend, tí hetta er triðja ferðin, at føroyskir svimjarar eru við har. Samstundis er ferðin skipað sum venjingarlega.

Sjálv kappingin verður í Køge frá fríggjadegnum til sunnudagin, og eru føroysku svimjararnir við í einum tíggju kappingum í part. Samanlagt eru ikki færri enn 3.100 startir í Køge Open.

Henda kappingin er fyri teir næstbestu svimjararnar í Danmark, tí teir bestu eru frammanundan við í DKM-kappingini, har eitt nú føroyski svimjarin Asbjørn Hansen hevur roynt seg. Malan Michelsen, sum eisini svimur niðri, verður tó við í hesi kappingini.

## Venjingarlega fyrst

At hetta ikki er ein kapping á allarhægsta stigi, verður hildið at vera ein fyrimunur fyri føroysku svimjararnar, sum tá kunnu væntast at fáa javnari kapping og dystast móti svimjarum, sum eru nøkulunda á sama stigi.

Sjálv kappingin byrjar sum sagt ikki fyrr enn fríggjadagin, men føroyska ferðalagið fór avstað longu í gjár, tí fyrst verður farið á eina lítla venjingarlegu.

Vant verður í somu høllini, sum kappingin verður í, so svimjararnir samstundis kunnu venja seg við umstøðurnar og kenna hyljarnar. Eisini verður vant nakað í Herfølge, nærhendis Køge.

Teir 35 svimjararnir eru úr feløgunum Ægir, Fuglafjarðar Svimjifelag, Skeggjum, Flot, Havnar Svimjifelag og Tvøroyrar Svimjifelag. 25 av teimum eru frá landsliðnum og hinir tíggju frá ungdómslandsliðnum.

Fyri teir eldru svimjararnar er talan eisini um eina upphiting til Oyggjaleikirnar, sum verða á Guernsey í summar.

Umframt teir 35 svimjararnar eru eisini seks leiðarar, tveir venjarar og nøkur foreldur við á ferðini.

**Føroysku svimjararnir**

| | | |
|---|---|---|
| Andrass Thomsen | 25.04.82 | HS |
| Janus T. Olsen | 12.02.86 | HS |
| Jóannes á Fløtti | 07.01.84 | HS |
| Sonni Eliasen | 04.01.79 | FS |
| Hanus Eysturdal | 26.03.89 | HS |
| Búi Rouch | 20.01.88 | HS |
| Egil Gunnarsson | 01.07.87 | HS |
| Aksal Holm Norðfoss | 06.12.87 | HS |
| Rúni Klein Hansen | 07.01.89 | HS |
| Ottar í Hjøllum | 30.01.87 | Flot |
| Beinir Danielsen | 23.02.88 | Flot |
| Per S.Hansen | 06.02.88 | Flot |
| Jákup Øssursson | 15.04.89 | FS |
| Rannvá Jacobsen | 13.05.82 | HS |
| Lisbeth L. Joensen | 31.04.87 | HS |
| Benthe Sikivat Andersen | 09.05.82 | TS |
| Karin Kristina Eysturberg | 09.04.88 | TS |
| Sára Ejdesgaard | 17.12.87 | TS |
| Katrin Sørensen | 11.06.82 | TS |
| Natalia Reinhardt | 26.02.89 | Ægir |
| Helga Djurhuus | 27.05.89 | HS |
| Annika Jacobsen | 14.01.86 | HS |
| Elida Bjarnadóttir | 06.09.88 | HS |
| Kristian Olsen | 06.03.85 | Ægir |
| Robin Jønsson | 18.04.90 | Flot |
| Pauli Ø. Mohr | 12.10.91 | FS |
| Erling Jacobsen | 13.02.90 | Skeggjar |
| Kári J. á Høvdanum | 06.04.90 | Skeggjar |
| Hildibjørg Joensen | 26.11.90 | TS |
| Paula Rasmussen | 20.12.90 | HS |
| Elspa Mørkøre | 22.10.91 | Skeggjar |
| Maria Vang | 27.09.90 | TS |
| Eyðbjørg Petersen | 16.01.90 | Skeggjar |
| Brynhild F. Jacobsen | 25.01.90 | HS |

# Neistin kann fáa samband við oddin

**Seinast feløgini hittust, endaði við javnleiki**

MANSHONDBÓLTUR
*Páll Holm Johannesen*

Ein dystur verður í bestu mansdeildini í kvøld. Í Runavík fær botnliðið, Tjaldur, vitjan av Neistanum.

Heimaliðið liggur leyst í botninum, og lítið røkist fyri, at teir fara at vinna seg longur fram á stigatalvuni.

Runavíkingar hava ligið í botninum alt kappingarárið, og einasta liðið, teir hava fingið stíg ímóti í endaspælinum, er júst mótstøðuliðið í kvøld, Neistin.

Neistin liggur á fjórða plássi-tvey stig frá bronsuplássunum. Fær Neistin fulla úrtøku í kvøld hava teir samband við oddin. Seinastu dystirnir hjá Neistamonnum eru ímóti VÍF, STÌF og Kyndli, og tí er líkt til, at havnarfelagið hevur ein týdningarmiklan leiklut í, hvar meistaraheitið endar í ár.

Fyrst er tó dysturin ímóti Tjaldri á skránni, og vinna Neistamenn dystin er teir aftur við í stríðnum um heiðursmerkini.

Dysturin í kvøld byrjar klokkan 20.00.

# FM í borðtennis

FM-kappingar í ein- og tvímansleiki fyri yngru deildirnar í borðtennis vóru í Havn um vikuskiftið, og úrslitini vóru hesi:

**Dreingir, einmansleikur:**
1. Sigurð Carlsson, TÓR
2. Ragnar Egilsson, TÓR
3. Hanus Stórhamar, TBF

**Dreingir, tvímansleikur:**
1. Sigurð Carlsson og Ragnar Egilsson, TÓR
2. Tórfinn Djurhuus og Brian Hansen, Streymur

**Gentur, einmansleikur:**
1. Marin í Dali, TBF
2. Rakul Magnussen, Streymur
3. Mildrið Djurhuus, Streymur

**Gentur, tvímansleikur:**
1. Rakul Magnussen og Mildrið Djurhuus, Streymur
2. Marin í Dali og Mariann Mikkjalsdóttir, TBF

**Smádreingir, einmansleikur:**
1. Sigurð Carlsson, TÓR
2. Fróði Jensen, TBF
3. Gunnar í Dali, TBF

**Smádreingir, tvímansleikur:**
1. Sjúrður Ferjá og Gunnar í Dali, TBF
2. Reidar Luid og Rói Agnarson, TÓR

**Smágentur, einmansleikur:**
1. Marin í Dali, TBF
2. Ann Tóra Láadal, Streymur
3. Mariann Mikkjalsdóttir, TBF

**Smágentur, tvímansleikur:**
1. Marin í Dali og Mariann Mikkjalsdóttir, TBF
2. Ann Tóra Láadal og Rudi Zachariassen, Streymur

**Piltar, einmansleikur:**
1. Reidar Luid, TÒR
2. Gilli Sørensen, TBF
3. Jónhard Ferjá, TBF

**Piltar, tvímansleikur:**
1. Gilli Sørensen og Fróði Jensen, TBF
2. Reidar Luid og Rói Agnarson, TÓR

**Pinkur, einmansleikur:**
1. Susie Midjord, TBF
2. Rakul Mikkjalsdóttir, TBF
3. Sheila Strøm, TBF

**Pinkur, tvímansleikur:**
1. Rakul Mikkjalsdóttir og Susie Midjord, TBF
2. Joan Thomassen og Sheila Strøm, TBF

**Smápiltar, einmansleikur:**
1. Jákup Thomassen, TBF
2. Teitur Justinussen, TBF
3. Jónhard Ferjá, TBF

**Smápinkur, tvímansleikur:**
1. Jónhard Ferjá og Jákup Thomassen, TBF
2. Teitur Justinussen og Rógvi Joensen, TBF

**Smápinkur, einmansleikur:**
1. Rakul Mikkjalsdóttir, TBF
2. Rannvá Jacobsen, TBF

**Smápinkur, tvímansleikur:**
1. Rakul Mikkjalsdóttir og Rannvá Jacobsen, TBF

FM-kappingar í eldru deildunum í ítróttarhøllini í Trongisvági leygardagin 29. mars.

## Føroyameistarar í judo

Føroyameistarakapping fyri einstaklingar í judo hevur verið á Oyrarbakka um vikuskiftið. Vinnarar í teimum ymisku bólkunum gjørdust:

**Nýbyrjaðir -26 kg:**
Jónas Johannesen, Sunda Judofelag

**Nýbyrjaðir -33 kg:**
Róar Sørensen, Havnar Judofelag

**Nýbyrjaðir -42 kg:**
Ellindur Ólavsson, Havnar Judofelag

**Nýbyrjaðir -48 kg:**
Brynleif Hansen, Sunda Judofelag

**Nýbyrjaðir, opin bólkur:**
Ellindur Ólavson, Havnar Judofelag

**Nýbyrjaðar gentur:**
Anna Katrin Sólskerð, Sunda Judofelag

**Dreingir -42 kg:**
Ellindur Ólavsson, Havnar Judofelag

**Dreingir +42 kg:**
David Nilssen, Havnar Judofelag

**Dreingir opin bólkur:**
Sigurbjørn Mørkøre, Sunda Judofelag

**Unglingar -63 kg:**
Teitur R. Joensen, Sunda Judofelag

**Unglingar +63 kg:**
Jákup Andrias Thomsen, Havnar Judofelag

**Unglingar opin bólkur:**
Jákup Andrias Thomsen, Havnar Judofelag

**Menn opin bólkur:**
Petur Sigurð Johannesen, Sunda Judofelag

Harafturat varð latið eitt fighter steyp til tann, ið undir kappingini sýndi stórstan dystarvilja og bestan teknikk. Hetta steypið vann Jógvan Páll Kristiansen úr Sunda Judofelag.



*Framhald av síðu 17*

sett sín dám á føroyskan fótbólt seinastu mongu árini. Hyggja vit burtur frá Jóannes Jakobsen og Kára Nielsen, sum tóku um endan hjá HB í fjør, so hevur felagið, ið hevur vunnið meistaraheitið, havt útlendskan venjara, síðan 1995. Tað árið vann Johan Nielsen sítt triðja meistaraheitið við gøtumonnum.

Í 1996 vann Páll Guðlaugsson við GÍ, Tomislav Sivic í 97 við B36, Ion Geolgau við HB í 1998, Tony Paris við KÍ í 1999, Krzystof Popczynski við VB í 2000, 2001 Piotr Krakowski við B36 og meistaraheitið í fjør hjá HB hevði útlendskt íslett við Ion Geolgau.

Annfinn Danielsen ásannar eisini, at fleiri útlendskir venjarar hava gjørt eitt gott arbeiðið, men vísur á, at fleiri feløg hava brent seg dyggiliga við útlendskum venjarunum.

– Útlendsku venjararnir arbeiða bara eftir einum úrsliti í 1.deild. Arbeiðið hjá teimum er tí merkt av at vera stutt siktað. Teir føroysku venjararnir arbeiða nógv meir langsiktað, og tí er ikki heilt rætt at samanbera úrslitini hjá einum útlendingi og einum føroyingi Tað er eisini ov lætt at siga, at teir hava havt tey bestu úrslitini, tí fleiri førum hava teir havt helvtina av landsliðnum at arbeitt við, greiðir Annfinn frá.

Føroysku venjararnir kenna nógv betri til føroysk viðurskiftið, menniskjaliga viðfer, røktan av yngri leikarum og sosial viðurskiftið annars. Á hesum økjum hava føroysku feløgini fleiri ferðir brent seg illa. Annfinn nevnir KÍ sum dømi:

– Hóast Tomislav Sivic hevði góð úrslit at vísa á í B36, so fall hann slett ikki til í Klaksvík. Hann arbeiddi bara eftir einum meistaraheitið í B36, men í Klaksvík var støðan ein heilt onnur. Hann skuldi byggja eitt nýtt lið upp, og hetta var nakað heilt annað enn hann var vanur við í B36, og hann megnaði tí ikki uppgávuna, fortelur Annfinn Danielsen um fyrrverandi KÍ-venjaran.

Føroyskur fótbóltur er nógv broyttur, síðan peningur kom inn. Feløgini nýta nógvar pengar til leikarar, og tí verður ofta minnið peningur til venjarastarvið. Flestu feløgini royna tí, sambært Annfinni, at finna útlendingar, sum eru leikandi venjarar, so feløgini fáa so stórt útbýtið úr íløgunum sum gjørligt. Hetta rák, heldur Annfinn vera sera keðiligt fyri føroyskan fótbólt, og í longdini verða tað teir ungu leikararnir, sum koma at sita við sviðið soð. Hann metir tí tað vera av stórum týdningi, at tað eru føroyskir venjarar til føroyskar leikarar.

- Hyggja vit eftir í Danmark, so eru tað danskir venjarar, sum standa á odda fyri flestu superligafeløgum, tí danskarar meta, at teir sjálvir kenna betur sínar egnu fótboltsspælarar enn útlendingarnir. Hesum áttu vit at gjørt teimum eftir, sigur Annfinn Danielsen.

## Nógvir eldri leikarar

Eitt annað rák, ið hevur tikið seg upp í føroyskum fótbólti er, at fleiri og fleiri fyrrverandi toppleikarar gerast venjarar úti í feløgunum, hóast teir onga venjaraútbúgving hava. Dømi um hetta hava vit í Jóannes Jakobsen, Kurt Mørkøre, Jan Joensen og Jens Erik Rasmussen og Jón Johannesen. Annfinn Danielsen heldur hetta er ein hættislig gongd.

– Handa gongdin er skilaleys, og hatta fer at koma feløgunum aftur um brekku, tí hesir eru hava onga bakgrund innan venjarastarvið, og tað kann fáa keðiligar avleiðingar fyri feløgini.

Fyri at hesir kunnu vera til størri gagn í føroyskum fótbólti, og fyri at vera við í mennningini av føroyskum fótbólti, hevði tað verið skilagott, um hesir tóku nøkur skeið innan fótbóltsvenjing. Tað krevur eina grundvitan um venjing at standa á odda fyri 1.deildarfeløgum, og við skúling høvdu vit fingið nógv meir buturúr hesum fyrrverandi toppleikarum, tí teir hava drúgvar royndir innan fótbóltin, sigur Annfinn Danielsen at enda.




